**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 17/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka**

Magni Laksáfoss, tingmaður, hevur lagt málið fram tann 10. september 2018, og eftir 1. viðgerð tann 27. september 2018 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 6., 20. og 22. november 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Okkara, Føroya Bjór, Rúsdrekkasølu landsins, Fólkaheilsuráðið, landsstýrismannin í heilsumálum, Sirið Stenberg, og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Poul Michelsen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

**Ein minniluti** (Jákup Mikkelsen, Helgi Abrahamsen og Bárður Kass Nielsen) vísir á, at tá Føroyar fingu nýggja rúsdrekkalóg í 1992 varð avgjørt, at ein einkarsøla skuldi taka sær av innflutningi og sølu av øllum rúsandi løgi. Tó vórðu nøkur undantøk gjørd í lógini. Millum annað fingu føroysku bryggjaríini loyvi at selja teirra egnu framleiðslu av øli.

Endamálið við einkarsøluni hevur alla tíðina verið at avmarka rúsdrekkanýtsluna og at minka sum mest um skaðan, sum rúsdrekkanýtsla kann hava við sær fyri einstaklingin og samfelagið.

Kanningar vísa, at atkoma og prísir eru sera avgerandi fyri, hvussu stór nýtslan av rúsdrekka er.

Einkarsølan er í einum dupultum leikluti, har endamálið er bæði at veita eina góða tænastu, og at avmarka søluna. Millum annað verður strangt eftirlit hildið við, at 18 ára aldursmarkið fyri at sleppa at keypa rúsdrekka verður hildið.

Skipanin við rúsdrekkasølu er eitt gott stýringsamboð til at tálma nýtsluna av rúsdrekka. Hetta amboðið verður munandi skert, um fyriliggjandi uppskot verður samtykt. Við at samtykkja hetta uppskotið fer talið av rúsdrekkasølum at tvífaldast, og harvið verður atkoman munandi størri.

Hesin minnilutin tekur tí ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Ein annar minniluti** (Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer og Ingolf S. Olsen) heldur, at rúsdrekka, heitvín og vín framhaldandi einans eiga verða seld ígjøgnum einkarsølu landsins. Hesin minnilutin tekur tó undir við, at bryggjaríini sleppa at selja egna framleiðslu av øli og cider, eins og tey gera í dag, og umframt hetta eisini tey ølsløg, sum í dag einans kunnu seljast gjøgnum rúsdrekkasølurnar. Við broytingini verður ikki longur neyðugt at fara í eina rúsdrekkasølu fyri at keypa ávís sløg av øli, tí bryggjaríini fáa heimild at selja egna ølframleiðslu.

Hesin minnilutin setir tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1. Í § 1, nr. 1 verður í § 7, stk. 3 “av øli” broytt til: “ av øli og cider”.
2. Í § 1, nr. 2 verður í § 8, stk. 1 ”av øli, sum í sær hevur hægst 5,8 rúmprosent av alkoholi” broytt til: ”av øli og cider”.
3. Í § 1, nr. 3 verður í § 8, stk. 2 ”øli” broytt til: ”egnari framleiðslu av øli og cider”.
4. Í § 1, nr. 4 verður í § 8, stk. 3, 2. pkt. ”øli” broytt til: ”egnari framleiðslu av øli og cider”

**Viðmerking**
Við hesi broyting fáa bryggjaríini loyvi til at útflýggja alla teirra egnu framleiðslu av øli og cider, uttan mun til styrki, men ikki vín, heitvín ella annað rúsdrekka.

Við hesum broytingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein triði minniluti** (Janus Rein) tekur støðu í málinum í tingsalinum.

**Vinnunevndin, 7. desember 2018**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørt Samuelsen<br>formaður | Janus Rein | Bjarni Hammer |
| Ingolf S. Olsen | Helgi Abrahamsen | Jákup Mikkelsen |
| | Bárður Kass Nielsen | |